

## Ja til aktiva deyðshjálp

Tá amerikanarar fóru til valkassarnar í gjár, skuldu teir eisini atkvøða um fleiri onnur mál enn forsetan. Ymsu statirnir skpaðu eisini fyri fólkaatkvøðu um ávís mál í viðkomandi statinum. Í statinum Washington á vestursíðuni á USA skuldu borgararnir millum annað atkvøða um aktiva deyðshjálp. Og borgararnir søgdu eitt klárt og týðiligt ja til, at doyggjandi sjúklingar skulu hava rætt at stytta um lívið við útskrivaðum heilivági, sum teir sjálvir umsita og dosera. Lógaruppskotið í Washington er útarbeitt við íblástri frá »Ein virðiligur deyði«-lógini í statinum Oregon, sum var fyrsti staturin í USA, ið innførdi aktiva deyðshjálp. Hendan lógin hevur verið í gildi í Oregon síðani 1997, og síðani tá hava 340 doyggjandi sjúklingar – í flestu førum sjúklingar við krabbameini – brúkt teirra rætt at stytta um lívið, skrivar Politiken.

# Klaksvík skyldar meir enn álíkning

**Samlaða skuldin hjá Klaksvíkar Kommunu verður um árslok oman fyri 170 mió. krónur, sum eru 35 mió. krónur meiri enn ein álíkning. Hetta sigur Óli M. Lassen, stjóri í Klaksvík, sum hevur roknað upp á tølini hjá kommununi**

SKULDARBYRÐA

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Støðan í Klaksvíkar kommunu er uppaftur verri, enn tað higartil er komið fram í ljósmála. Tað heldur Óli M. Lassen, stjóri í Klaksvík, sum hevur sett seg at rokna upp á fíggjartølini hjá kommununi.

- Í 2008 verða goldið rentur og avdráttir fyri góðar 14 mió. krónur, og í 2009 verða renta og avdráttir á leið 18 mió. krónur. Næsta ár kemur Norðhavnin inn í kommunuroknskapin, og við at gera skuldina upp, sæst, at lánini eru upp á 133 mió. krónur og stuttfreistað skuld einar 15 mió. krónur, meðan Norðhavnin stendur í 23 mió. krónum. Hetta gevur tilsamans eina skuld upp á 171 mió. krónur, sigur Óli M. Lassen, stjóri í Klaksvík.

Hann vísir á, at roknast kann við, at ein álíkning er áleið 138 mió kr., og tí er talan um, at Klaksvíkar kommuna skyldar 35 mió. krónur meir enn eina álíkning.

- Tað er alneyðugt, at kommunan fær hetta í rættlag sum skjótast, sigur Óli M. Lassen og vísir á, at raksturin hjá kommununi er galoperaður tey seinastu árini.

Hann heldur, at hækkandi inntøkur hava ført til munandi øking í rakstrarútreiðslunum.

- Saman við íløgum og rakstri hevur kommunan tey seinastu fýra árini nýtt munandi meir, enn tað er komið inn í skatti og øðrum inntøkum. Hetta saman við, at tað er trupult at fáa lán orsakað av altjóða fíggjarkreppuni, hevur havt við sær, at kommunan hevur fingið so vánaligt gjaldføri, sigur stjórin í Klaksvík.

Eitt sera stórt lop í vøkstrinum eru hend innan barnaansing og barnaverdarøkið, har útreiðslurnar svara til 23 prosent av rakstrinum hjá kommununi. Hesar eru síðani 2000 øktar við 22 mió. krónum; úr átta upp í 30 mió. krónur. Óli M. Lassen sigur seg tó frøast um, at kommunan hevur megnað at fáa fleiri ansingarpláss, tí neyðugt er at hava hetta økið væl útbygt.

Eisini innan kommunalu umsitingina er økingin sera stór. Í 2000 var kostnaðurin av umsitingini góðar seks mió. krónur, og í 2008 er metingin, at umsitingin kostar á leið 15 mió. krónur. Altso meir enn ein tvífaldan upp á átta ár.

Óli M. Lassen heldur, at tað sum Klaksvíkar kommuna hevur harðast brúk fyri í løtuni, er ein neyv fíggjarstýring, um tað skal vera nóg mikið av gjaldføri og møguleiki skal vera fyri at gera íløgur í framyvir.



*Óli M. Lassen vísir á, at í ár 2000 var raksturin hjá Klaksvíkar kommunu 45 prosent av inntøkunum, í 2004 var hann 69 prosent og í 2008 er metingin, at raksturin verður heili 72 prosent av inntøkunum. Hetta vísir, heldur hann, hvussu lítið skil hevur verið á fíggjarstýringini í kommununi*

# Serfrøðingur skal betra um rakstur

**Á býráðsfundi í gjárkvøldið samtyktu 9 býráðslimir í Klaksvík at hækka skattaprosentið úr 20,75 upp í 21,75. Ein atkvøddi ímóti hesi hækkingini.**

KOMMNUNA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Við hesi hækkingini fer fíggjarætlanin fyri 2009 at javnviga við góðum 131 mió krónum. Á útreiðslusíðuni verða 90 mió til rakstur og góðar 23 mió til íløgur, millum annað til liðugtgerð av Ósáskúlanum.

Umframt hetta varð millum annað samtykt, at frítíðarskúlin skal halda fram, at Atlantis skal halda fram og at peningurin er játtaður til virksemið í Dagtilhaldinum.

Samstundis varð samtykt, at ein serfrøðingur skal setast at greina út og betra um raksturin í kommununi.

### Flyta úr kommununi

Undir viðgerðini av fíggjarætlanini vístu fleiri býráðslimir á tað óhepna í, at inntøkurnar hjá kommununi ikki vóru størri.

Hesar seinastu vikurnar hava bæði samgonga og andstøða gjørt eitt stórt arbeiði saman at greina út fíggjarligu støðuna í kommununi. Samstundi hava tey sett saman eitt uppskot til fíggjarlóg við teimum sparingum sum eru neyðugar fyri at fáa raksturin at hanga saman.

Víst varð á, at nógvar íløgur eru gjørdar í kommununi hetta brátt farna valskeiðið. Tikið varð til, at kommunan helst hevði sett ov nógvar verkætlanir í gongd samstundis.

Allar hesar íløgurnar hava sjálvandi kostað pening, men semja var um, at allar hesar fóru at verða borgararnum at gagni sum fráleið.

Ein samgongulimur vísti á tað sera óhepna í, at kommunan sá seg noydda at hækka skattin nú, samstundis sum vanligu húsarhaldini knógva undir øktum oljuprísi, matprísum og rentuhækkingum.

Víst varð á, at við hesi gongdini kundi úrslitið lættliga gerast, at fólk fer at flyta í aðrar kommunur í økinum, har skattaprosentið er munandi minni. Onkur annar býráðslimur vísti hinvegin á, at ein t.d. í Runavík hevur hægri skattaprosent enn Klaksvík, og at eingin tosaði serliga hart um tað.

### Lærdómur

Ein annar býráðslimur úr samgonguni dró líkasum samanum viðgerðina hesar seinastu vikurnar við at



*Klaksvíkingar skulu gjalda meiri í skatt komandi ár*

siga, at hetta spariumfarið hevði gjørt teimum greitt, hvussu kommunan fór at síggja út aftaná.

- Kommunan er eitt sindur sperd og er dýr at reka. Men vit fara at reisa okkum aftur, vísti borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen at enda á.

Eitt broytingaruppskot frá tveimum samgongulimum um ávísar reguleringar í fíggjarlógini fyri 2009 vann ikki frama.

Hinvegin varð uppskotið hjá samgongu og andstøðu um millum annað skattahækkingina samtykt av øllum býráðslimum, uttan Atla Justinussen. Hann atkvøddi ímóti uppskotinum, meðan Gunvá við Keldu atkvøddi blankt.